**Fiskimálaráðið**

Dagfesting: 19. mars 2018
Mál nr.: 18/00038-5
Málsviðgjørt:

**Uppskot til**

# Kunngerð
# um
# stuðul til landbúnaðin

Við heimild í § 1, stk. 3 í løgtingslóg nr. 32 frá 6. mars 2003 um landbúnaðarstuðul, og við heimild í § 2 í løgtingslóg nr. 18 frá 4. mai 1961 um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m., verður ásett:

## Kapittul 1
## Økið

**§ 1.** Studningur kann latast til mjólk, neytakjøt, seyðakjøt, stráfóður, súrhoysbrunnar, velting v.m., djórahald, avloysaraskipan og føroysk húsdjórasløg.
*Stk. 2.* Studningur sambært stk. 1 er treytaður av, at umsøkjari er bókhaldsskyldugur og meirvirðisgjaldsskrásettur sambært galdandi lóggávu. Studningur til føroysk húsdjórasløg er undantikin ásetingunum um bókhaldsskyldu og MVG-skráseting.

## Kapittul 2
## Treytir

*Mjólk*

§ 2. Studningur verður latin til mjólk, sum er í 1. flokki, og til flutnings av henni til løggilt mjólkarvirki.
*Stk. 2.* Studningurin verður útgoldin mjólkarvirki sambært váttaðum innvigingarlista.
*Stk. 3.* Flutningsstudningur verður veittur mjólkarvirki eftir somu treytum sum mjólkarstudningurin, bæði hvat viðvíkur góðsku og mongd.

*Neytakjøt*

§ 3. Studningur verður latin til neytakjøt, um neytið er í aldrinum 1-16 mánaðir.
*Stk. 2.* Studningur verður latin til neytakjøt, um neytið er eldri enn 16 mánaðir.
*Stk. 3.* Hægri studningur kann latast til neytakjøt av útoyggj, sum er Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Nólsoy, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

*Seyðakjøt*

§ 4. Studningur til seyðakjøt er ein heilt ella lutvís afturbering av goldnum MVG fyri selt seyðakjøt.
*Stk. 2.* Søkjast skal um studning fyri hvønn ársfjórðing sær, og freistin at søkja er 10

dagar aftaná, at avrokningarfreistin til TAKS er úti.

*Stk. 3.* Búnaðarstovan ger eina meting av játtanini í mun til væntaðar umsóknir í árinum. Endalig uppgerð verður gjørd, tá seinasti ársfjórðingur er uppgjørdur. Krevjast kann váttan fyri, at kjøtið er av tí garði, sum umsøkjarin situr við.

*Stráfóður*

§ 5. Studningur verður latin til føroyskt framleitt stráfóður, sum verður brúkt í neytahaldinum og seyðahaldinum. Stráfóður er súrhoyggj í brunni ella rullubyrðu og hoyggj.

*Stk. 2.* Studningur kann vera treytaður av, at fóðrið lýkur ásett góðskukrøv frá Búnaðarstovuni.

*Djórahald, húsdjóraaling og húsdjórahald*

§ 6. Studningur kann veitast til keyp og hald av góðum alidjórum og til ísáðing, kynbøtur, skráseting og annað mennandi virksemi húsdjórahaldinum at frama.

*Stk. 2.* Studningur kann veitast til at skipa viðurkendar húsdjórasýningar.

*Stk. 3.* Studningur kann veitast til verkætlanir, royndir og kanningar húsdjórahaldinum at frama.

*Føroysk húsdjórasløg*

§ 7. Studningur kann latast til alidjór og til verkætlanir, sum eru góðkend/góðkendar av Búnaðarstovuni.

*Avloysaraskipan*

§ 8. Studningur verður veittur sum eitt ískoyti til skipanina við, at mjólkaframleiðarar og mjólkarvirki rinda eina nærri ásetta upphædd fyri liturin av innvigaðari mjólk í grunn til at gjalda avloysing fyri. Studningurin verður goldin framleiðarum 1. mai, samsvarandi tí mjólk, sum er latin mjólkarvirkinum árið fyri. Hesin studningur kann ikki avhendast ella veðsetast.

## Kapittul 3
## Umsiting, umsóknir og kæra um avgerðir

§ 9. Búnaðarstovan umsitir studning sambært hesi kunngerð.

*Stk. 2.* Studningur verður veittur eftir umsókn. Umsóknir um stuðul skulu latast Búnaðarstovuni á serligum umsóknarblaði.

*Stk. 3.* Búnaðarstovan hevur eftirlit við, at treytirnar fyri studningi sambært hesi kunngerð verða hildnar.

## Kapittul 4
## Gildiskoma

§ 10. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 99 frá 4. november 2010 um stuðul til landbúnaðin.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/Rógvi Reinert (sign.)